


Vi› okkurt um 25.000 ymiskum vørum á hyllunum, stendur landsins størsta goymsla av eykalutum til taks hjá føroyska flotanum. Aftanfyri stendur eitt samtak av trimum føroyskum skipasmi›jum og einum mekaniskum verksta›i, i› hevur meir enn seksti ára royndir innan veitingar til skipaflotan - alt frá smærri umvælingum og vi›líkahaldi til um- og n‡bygging av skipum.

Gó›kendir tænastuveitarar av:
Wärtsilä
Deutz-MWM
Scania & Valmet
Callesen
Ulstein Brattvaag
ABB-Turbochargers
Desmi pumpum

*Ein depil innan skipatænastur*

stephanssons hús

**P/F Tórshavnar Skipasmi›ja**
Tlf. +298 31 11 55
Fax +298 31 11 25
e-mail: info@faroeyard.fo

**P/F Skipasmi›jan á Skála**
Tlf. +298 44 11 55
Fax +298 44 11 25
e-mail: skala@faroeyard.fo

**Vestmanna Skipasmi›ja**
Tlf. +298 42 40 10
Fax +298 42 40 05

**Runavíkar Mekaniski Verksta›ur**
Tlf. +298 44 70 36
Fax +298 44 78 34

www.faroeyard.fo



SALONG 44 99 03

Stutt & Greitt

v/Sólvu G. Funderud • Strendur



Sosialurin 341800



BRENDERUP..

Føroya mest seldi viðfestisvognur
verður eisini at síggja á Sølurásini




Nógv sera góð tilboð

HANSEN · tel 218540

Sosialurin 341800


# Bilar

Nr. 211 • hósdagur • 6. november 2003 • 77. árg.

Mazda3:

## Hatchback og sedan til sama prís




*Her er Jákup Jacobsen, sølumaður hjá Berg Motors, tveimum Mazda3, einum bláum 1,6i sedan við 105 hk, og einum gulum Sport 2,0i hatchback við 150 hk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Mazda3, sum enn ikki er komin á evropeiska marknaðin, er longu her hjá okkum bæði sum hatchback og sum sedan. Koyrieginleikarnir og kvaliteturin á bilinum eru á sera høgum støði**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað at Mazda verða innfluttir beinleiðis til Føroya, hevur við sær at teir ofta eru her hjá okkum, áðrenn teir koma á evropeiska marknaðin. Eisini fáast teir í fleiri øðrum útgávum, sum t.d. nú Mazda3 eru komnir bæði sum hatcback og sedan, ið báðir eisini fáast í Sport útgávuni við t.d. xenonlyktum, regnsensorum og 17" alufelgum. Hvat útgerð viðvíkur fáast teir í útgávunum LX, GLX og Sport.

Allar útgávurnar hava 6 airbag sum standard og aktivar nakkapútur, sum stuðla høvdinum væl, um bilurin verður ákoyrdur aftanífrá. Bilurin bilurin hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir.

Mazda leggja seg eftir at gera familjubilar við sportligum designi og koyrieginleikum.

Mazda3 hevur fingið avbera góð ummælir allastaðni, og bleiv hann valdur til Ársins bil í Danmark, áðrenn hann er komin á danska marknaðin. Grundgevingarnar fyri at Mazda3 bleiv ársins bilur í Danmark eru fleiri, sum t.d. at hann hevur smart design, sera góðar koyrieginleikar og umfatandi trygdarútgerð.




*Mazda3 aftan. Eingin prísmunur er millum hatchback og sedan í somu útgávu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Sedan og hatchback sama prís

Bilurin er nýggjur bæði uttan og innan og hevur lítið og einki við forgangarin, Mazda 323, at gera. Koyrieginleikarnir eru góðir og sportligir, bilurin liggur væl á vegnum og koyrir sum ein dreymur í svingum. Undirvognurin er nýggjur við einum framkomnum "multilink" upphangi aftan, sum ger sítt til góðu koyrieginleikarnar.

Bilførarin situr væl í bilinum, og setrini í øllum útgávunum eru eins góð at sita í. Instrumentborðið er nakað fyri seg við trimum trakt-formaðum instrumentum framman fyri bilføraran. Kvaliteturin á bilinum er á høgum støði, tað merkist allan vegin ígjøgnum.

Eingin prísmunur er á sedan og hatchback, teir kosta tað sama í øllum útgávunum.

Tveir motorar eru at velja ímillum, teir eru 1,6i við 105 hk og 2,0i við 150 hk. Sport fæst tó bert sum 2,0 við 150 hk. Komandi ár fæst Mazda3 við commonrail dieselmotori.

Frá Berg Motors verður sagt, at fyrsti Mazda3 bleiv seldur til Vágs, og hetta var fyrsti Mazda3, sum varð seldur í Evropa.



*Mazda3 innan. Instrumentborðið er nakað fyri seg við trakt-formaðurm instrumentum framman fyri bilføraran*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Mazda3 1,6i LX hatchback

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur 4 syl. bensin 105 hk |
| 0-100 hk | 11,0 sek |
| Bensinnýtsla | 13,9 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 442,0 cm |
| Breidd | 176,0 cm |
| Hædd | 147,0 cm |
| Egínvekt | 1100 kg |
| Viðførisrúm | 300 litrar |
| Prísur | kr. 176.700,- |
| Søluumboð | Berg Motors<br>Staravegur 1-2<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313535 |